


SJÓVINNUBANKIN

KVITTAN

METT RENTA A LANI NR

FYRT 1990

HR [redacted]

ADKAR INNTØKUR AMINNINGARGJALD

0100 TORSHAVN

Vinarlig heilsan
SJÓVINNUBANKIN

080190 306 0011 [redacted] 25,00- FLT
080190 306 0012 [redacted] 25,00+ FLT

Tað kostar at spyrja bankan

Nú kostar at spyrja Sjóvinnubankan.

Hevur ein konto í Sjóvinnubankanum, og vil vita, hvat metta rentan er fyri í ár, í samband við skattauppgerðina, kostar hendan upplýsing 25 krónur. Og hetta er eisini einasti vegur at ganga fyri at fáa hetta at vita. Tí bankin sendir ikki longur út hesa fráboðan, sum hann áður hevur gjørt.

Steingrím Nielsen, stjóri sigur orsøkina vera, at hetta arbeiði kostar bankanum rættiliga nógv. Haraftrat eru tey fá, sum brúka hesa upplýsing til nakað. Spurdur um tað kostar nakað at fáa hetta at vita, var svarið nei.

Nú hava vit kortini fingið prógv fyri, at hetta kostar.

TAÐ FER AT KOSTA Í SPARIKASSANUM

Heldur ikki Sparikassin sendir upplýsingar um metta rentu út til viðskiftafólk síni. Men hinvegin tekur Sparikassin ikki nakað fyri tað, um ein spyr. Men tað fer at kosta,- um ein mánað ella so.

Frá Føroya Banka verður sagt, at hann sendir út hesar upplýsingar uttan tað er neyðugt hjá fólki at spyrja um teir. Sama ger Fossbankin.

tór.-

Enn óvist við útbúgvingarstuðlinum

Fundur verður millum landsskúlafyrisitingina og landsstýrið í komandi viku, har avgjørt verður, hvussu mikið stuðulin skal skerjast.

Av røttum skal útbúgvingarstuðulin fyri ársins fyrsta mánað verða útgoldin hósdagin. Men enn er ógreitt, hvussu stórur ella lítil hann verður.

Á fíggjarlógini er stuðulin skerdur nakað, og alt bendir á, at stuðulin í ár verður umleið 20% minni enn hann var í fjør. Hetta verður avgjørt í komandi viku, tá landsskúlafyrisitingin fer at tosa við landsstýrismannin í skúlamálum, Signar Hansen.

Ein 20% stór skerjing merkir, at tey, sum fáa mesta stuðul - eldri enn 18 ár og búgva hjá øðrum - fáa umleið 6.000 krónur minni enn í fjør.

tór.-

